## Kringvarpið egin stovnur

Grønlendski tinglimurin Josef Motzfeldt er nú komin við uppskoti um, at tað almenna kringvarpið KNR verður loyst frá landsstýrinum og skipað sum ein sjálvsognarstovnur. Josef Motsfeldt vísir á, at starvsfólkini í kringvarpinum støðast illa, og hann heldur, at sum sjálvsognarstovnur kann kringvarpið bjóða starvsfólkinum betri sømdir enn nú. Hann vil nú hava politikararnar at tosa um, hvussu KNR skal fíggjast og stýrast sum egin stovnur.



*Grønlendska kringvarpið verður kanska sjálvsognarstovnur*

*Mynd: KNR*

## Seldu nógvan fisk

Apríl mánaður royndist væl hjá norsku fiskavøruútflytarunum. Tølini vísa, at hendan mánaðin seldu norskar fyritøkur fisk og fiskavørur av landinum fyri 2,9 milliardir norskar krónur, og tað er 15 prosent meiri enn í sama mánaði í fjør. Í síðsta mánaði seldu norðmenn laks fyri 1,3 milliard krónur, og størsti vøksturin var á marknaðunum í Russlandi og Póllandi. Saltfiskasølan vaks heili 80 prosent og kom upp í 322 milliónir krónur.

# Ikki plástur men ein kunst-tarmur



*Jørgen Jørgensen, slaktarameistari í Miklagarði, fegnast um, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan nú hevur staðfest, at talan var um sterilan kunsttarm, sum varð funnin í einum pakka av livradeiggi, og ikki eitt heftiplástur, so sum Sosialurin skrivarði 28. februar*

**Tað var eitt petti av kunsttarmi, sum var í livradeigginum, sum ein maður keypti í SMS tann 27. februar. Kunsttarmur er sterilur og verður brúktur í pylsuframleiðsluni**

MATVØRUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Í Sosialinum 28. mars skrivaðu vit um ein mann, sum hevði keypt ein pakka av livradeiggi í Miklagarði, har eitt fremmandlikam var í, sum í fyrstu syftu varð hildið at vera eitt heftiplástur.

Maðurin gjørdist sera skakkur av hesum, tí sum vera man er tað sera ólekkurt at finna eitt heftiplástur í matvørum.

Pakkin fór á Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, har fremmandlikamið varð kannað. Í fyrstu atløgu søgdu tey, at tað líktist einum heftiplástri, men tað kundu tey ikki staðfesta, fyrr enn gjøllari kanningar vórðu gjørdar.

Tey í Miklagarði fingu til vega eitt stykki av kunsttarmi frá veitaranum, sum er latin Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

Jørgen Jørgensen, slaktarameistari í Miklagarði segði beinanvegin við 100% vissu, at einki heftiplástur ella nakað annað fremmandlikam varð komið í matin í Miklagarði, tí innanhýsisreglugerðin er so strong, at hetta ikki letur seg gera. Hann segði eisini, at eingin hjá slaktaranum í Miklagarði arbeiðir við heftiplástri á hondunum.

Tá Sosialurin tosaði við Jørgen Jørgensen í gjár, hevði hann ikki frætt um úrslitið frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni – og hann fegnaðist sum vera man.

- Hatta vísir bara, at tað loysir seg at bíða, til man hevur hoyrt allar partar í einum máli, heldur enn at fara út við einum ódokumenteraðum pástandi, sigur Jørgen Jørgensen, slaktari, sum heldur at Sosialurin í hesum føri hevur verið ov skjótur við avtrekkjaranum.

Hann skilir væl, at fólk argast, tá tey finna eitthvørt í matinum, sum ikki skal vera har. Men sum hann eisini vísti á í Sosialinum 31. mars í ár, so er tað stórur munur á, um talan er um eitt heftiplástur ella – sum tað nú vísti seg – eitt petti av kunsttarmi.

- Kunsttarmurin er sterilur, og hann verður brúktur í pylsuframleiðsluni. Hann skal sjálvandi ikki vera í livradeiggi, men eingin fær skaða av honum kortini, sigur Jørgen Jørgensen, sum er vísur í, at hesin kunsttarmur ikki kann vera komin í livradeiggið í Miklagarði, men í framleiðsluliðnum áðrenn.

Jørgen Jørgensen sigur, at tey sjálvandi merktu tað á søluni, tá søgan stóð á forsíðuni á Sosialinum. Men kortini var tað eingin annar, sum boðaði frá nøkrum fremandlikami í livradeigginum.

- Eg skilji væl, at fólk gera vart við slíkt, og vit vilja sjálvandi halda eyguni meira opin – vera meira árvakin, sigur Jørgen Jørgensen, slaktarameistari í Miklagarði, sum er sera fegin um, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan er komin til hesa niðurstøðuna.

# Deyður stórhvalur eystanfyri Nólsoynna

**Ein deyður stórhvalur fleyt eystanfyri Nólsoynna í gjár. Brimil fór at leita og sleipaði hvalin einar 60 fjórðingar úr landi**

STÓRHVALUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*
*myndir: Bárður Jensen*

Ein útróðrarbátur boðaði frá, at ein stórhvalur fleyt eystanfyri Nólsoynna.

Brimil fór at leita eftir hvalinum, og út fyri Drangunum, sum nólsoyingar rópa tað, funnu teir hvalin flótandi deyðan. Endi varð settur fastur á sveivin, og hvalurin sleipaður einar 60 fjóringar út frá landi.

Tað stóð ramur rotroykur úr hvalinum, so hann man hava floti deyður í rúma tíð, hvøljan var fyri tað mesta skalla av honum.



*Báturin hjá Brimli hevur sett fast á stórhvalin*



*Og síðani sleipaði Brimil hvalin 60 fjórðingar eystur úr landi*